Ársfrágreiðing 2017/2018

Aðalfundurin 14. mars 2018

Ársfrágreiðing 2017/2018

Starvsnevndin
Í starvsnevndini sita teir av aðalfundinum valdu limir: Formaðurin/kvinnan og 4 limir. Starvsnevndarlimir kunnu vera afturvaldir eina ferð.
Starvsnevndin skipar seg á fyrsta fundi eftir ársaðalfundin við næstformanni.

Øll viðkomandi mál verða viðgjørd í starvsnevndini, og hevur starvsnevndin ein fund um mánan, tó undantikið juli og desember.

Á fundi tann 3. mai 2017 skipaði starvsnevndin seg við Jørmund Foldbo sum næstformanni.

Tey, ið hava mannað starvsnevndina síðan seinasta aðalfund eru:
Tóra við Keldu, forkvinna
Jørmund Foldbo, n. formaður
Anna Dahl Olsen
Hallur Thomsen
Malan Mohr
Randfríð Skorheim, tiltakslimur, hevur verið nevndarlimur eitt tíðarskeið fyri Maluna Mohr.

Skrivstovan
Tóra við Keldu hevur verið forkvinna í MEGD síðan seinasta aðalfund, og er at hitta á skrivstovuni mikudag.

Á skrivstovuni starvast Ása Olsen, sum er aðalskrivari. Jóhanna Hansen skrivstovufólk og Gullbjørg Rasmussen er reingerðarfólk.

Arbeiðsuppgávurnar á skrivstovuni eru sera nógvar og víðfevndar.

Nógv av arbeiði hevur verið viðvíkjandi hoyringsarbeiði í samband við lógarsmíð, broyting í lógum og kunngerðum og viðvíkjandi byggimálum. Umsiting av parkerings- og fylgjarakortum, og samráðingar við at víðka fylgjaraskipanina. Fundarvirksemi, samskifti og ráðgeving bæði til limafeløg, almennar myndugleikar og privatpersónar.

Nógv fólk venda sær til MEGD við fyrispurningum av ymiskum slag, og fær skrivstovan í miðal millum 250-300 fyrispurningar um mánan. Men so vítt møguligt átekur MEGD sær ikki einstaklingamál, uttan so, at tað hevur serligan almennan áhuga. MEGD metir eisini, at limafeløgini eru betur før fyri at loysa einstaklingamálini.

Skrivstovan ger hagtøl yvir hvussu nógv venda sær til felagið um árið. Í 2017 hava umleið 300 fólk vent sær til skrivstovuna hvønn mána. Talan er bæði um føroyingar og útlendingar.

ST-sáttmálin og niðurstøður úr ST verða nýtt sum grundarlag fyri øllum okkara arbeiði.

Fíggjarviðurskiftir
Stuðulin yvir fíggjarlógina fyri 2018 er 1,6 mill. Við støði í lóg um ítróttarvedding fær MEGD tillutað 5% av veddingarpengunum. Upphæddin fyri 2017 var 1.022.000 kr. Orsøkin til hesa met stóru upphæddina er ein regulering av avgjaldi av vinningum í Føroyum, sum

eftir órøttum ikki er flutt, eins og rættiliga stóru vinningarnir, sum føroyingar hava vunnið í fjør. Vit hava ikki fingið at vitað enn, hvussu stór upphæddin fyri 2018 verður. Hesin peningur kemur bæði MEGD og limafeløgunum til góðar.

Býtislykilin
Sambært viðtøkunum hjá MEGD, skal aðalfundurin taka støðu til býtið av fíggjarliga stuðlinum til limafeløgini, eftir at raksturin hjá MEGD er frádrigin.

ST-sáttmálin
MEGD arbeiðir miðvíst við at minna á niðurstøðurnar úr ST og fyri at ávirka almenna myndugleikan, at arbeiða málvíst við at gera neyðugar broytingar, so at vit kunnu síggja, at arbeitt verður miðvíst út frá sáttmálanum og niðurstøðunum.

MEGD hevur havt regluligt samskifti við Almannamálaráðið viðvíkjandi at seta tilmælini frá ST nevndini í verk í Føroyum. Serliga eru tað tilmælini viðvíkjandi grein 33 í ST sáttmálanum fyri einstaklingar, ið bera brek, ið hevur verið arbeitt við.

Viðvíkjandi Mentamálaráðnum eru tað serliga viðurskiftir, ið viðvíkja at teksta sendingar í KVF, ið arbeitt hevur verið við.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið arbeiðir við at seta á stovn ein stovn, ið skal hava eftirlit við at sáttmálin verður settur í verk á øllum økjum í Føroyum.

Niðurstøðurnar frá ST nevndini eru okkara amboð mótvegis politiska myndugleikanum.

Bústaðarviðurskiftir
Í løtuni er stórur mangul uppá egnaðar bústaðir serliga í Tórshavn. Tíverri hevur man brúkt hendan tørvin fyri at royna at byggja so nógvar bústaðir sum gjørligt í sama øki, har Eirargarður liggur. MEGD hevur verið aktivt inni í hvørjum av hesum málum, har MEGD í fyrsta umfari hevur sent hoyringsskriv inn, fyri síðan at taka málini upp við avvarðandi feløg og myndugleikar.

MEGD verður hoyrt í nógvum førum, og kann her vísast til, at ætlanin var at byggja eitt heim til børn- og ung við autismu, og leggja hendan stovnin við síðuna av sambýlinum Eystan Heyg, har man somuleiðis hevur ætlanir um at byggja eitt sambýli fyri sálarsjúk. Stovnurin fyri børn- og ung við autismu er nú fluttur út á Argir.

Ætlanin hevur verið at útbyggja Eirargarð so at har koma at verða 36 íbúðir til fólk við menningartarni og seinheilaskaða. Hendan verkætlan er fyribils steðga eftir at MEGD sendi eitt rættiliga álvarsligt hoyringsskriv til Almannamálaráðið. Nú verða partarnir tiknir við í einari tilgongd viðvíkjandi Eirargarði.

Arbeiðsmarknaður
Ása Olsen er stýrislimur í Dugna. Skúlin við Áir bjóðar nú fyrireikingarflokk til 9. flokk og 9. flokk.
Dugni er ein endurbúgvingarstovnur undir Almannamálaráðnum, sum er skipaður sambært viðtøkum frá 1. juli 2012. Endamálið hjá Dugna er millum annað at royna arbeiðsevnini hjá borgarum, ið eru vinnutarnaðir, og at skipa fyri arbeiðsvenjing, endurbúgving og umskúling, so vinnutarnað aftur kunnu fara til arbeiðis.

Visjónin hjá Dugna er, at øll sum fáa pláss á Dugna, skulu koma í útbúgving ella arbeiði.

Fountainhúsið
Er skipað sum ein royndarverkætlan, ið bjóðar arbeiðsrættað tilboð til persónar, sum eru sálarsjúkir ella hava sálarligar trupulleikar. Tilboðið hevur koyrt nú í trý ár, og hevur hetta tilboð virkað væl.

Miðnámsútbúgving, serliga skipað miðnám
Umframt flokkin á Kambsdali, byrjaðu flokkar av næmingum á Glasi og á Tekniska skúla í Klaksvík. Tíverri vísir tað seg, at upptøkurnar fyri skúlaárið 2017/18 ikki eru í tráð við álitið um serliga skipað miðnám.

Atkoma
Hóast Teknmálstulkatænastan síðan 2015, hevur havt eina hægri játtan at seta skrivitulk, er skipanin við skrivitulki ikki farin rættiliga í gongd enn.

Í samband við, at nýggjur Public Service sáttmáli er gjørdur, er støðan hjá deyvum og fólkum við niðursettari hoyrn beinleiðis umrøddur í sáttmálanum.

Hesa umrøðu saman við niðurstøðunum úr ST hevur MEGD brúkt í arbeiðinum at fáa sett gongd á, at sendingar blíva tekstaðar, serliga eru tað føroyskar mentanarsendingar.

MEGD var saman við Felagnum fyri Hoyribrekað á fundi við Fíggjarnevndina í Løgtinginum, har hesi viðurskiftir vóru umrødd. KVF hevur fingið nýggjan stjóra, og hevði MEGD fund við nýggja stjóran í oktober, har vit umrøddu avbjóðingina við at fáa sendingar tekstaðar. Kringvarpsstjórin metti, at um tað ikki bar til at fáa eina oyramerkta játtan á fíggjarlógini til endamálið, máttu tey í KVF finna eina loysn. Nú kunnu vit við gleði ásanna, at fleiri sendingar eru tekstaðar og verða tekstaðar.

MEGD hevur havt nógv arbeiði orsaka av atkomuviðurskiftum til bygningar. MEGD harmast um, at hóast nýggj bygningskunngerð varð sett í gildi 1. Januar 2017, kemur tað í fleiri førum fyri, at kafeir og matstøð fáa loyvi at lata upp uttan at atkomuviðurskiftini eru í lagi, og skapar hetta nógv eyka arbeiði og orku, at fylgja upp uppá viðurskiftir, ið kommunurnar sjálvsagt skulu hava í huganum, tá loyvir verða givin.

MEGD er vælvitandi um, at tað eru nógvar kommunur, ið halda bygningskunngerðina, somuleiðis eru tað nógvir eigarar, ið sjálvir hugsa um atkomu, tá teir opna nýggj matstøð ella kaféir.

Fylgjara kort
Síðan skipanin varð sett í verk, hava 312 fólk, ið bera brek fingið fylgjarakort. Í 2017 gjørdi MEGD avtalu við Atlantic Airways um fylgjaraskipan, so at nú eru tað einans biografarnir, ið ikki eru við í skipanini.

Vit hava ikki frætt um annað enn at skipanin virkar væl allastaðni.

HNR og Rådet för Nordisk samarbejde

Í 2017 og 2018 hevur MEGD formansskapin í HNR, Handikaporganisationernes Nordiske Råd, og tekur skrivstovan í MEGD sær av øllum fyrireikingum til hesar fundir og er annars skrivstova hjá HNR hesi tvey árini.

Tey, ið sita sum umboð fyri tey Norðurlendsku meginfeløgini eru formenn/kvinnur og aðalskrivarar í meginfeløgunum.

Rådet för Nordiskt samarbejde hevur verið virkið síðan 2013. Tóra við Keldu, forkvinna umboðar MEGD í ráðnum, og Ása Olsen, aðalskrivari er tiltakslimur í ráðnum.

Lógararbeiði
MEGD fær nógv lógaruppskot til hoyringar. Vit halda fram at skipað lógararbeiðið soleiðis, at allar lógir og kunngerðir, sum MEGD fær til hoyringar, verða sendar út til øll limafeløgini. Í teimum førum, har vit heilt greitt duga at síggja, at lógaruppskotið ella kunngerðin fevnir um limir í einum ávísum felag, seta vit okkum í samband við felagið. Hetta er serliga galdandi í byggimálum, ella tá ein ávísur bólkur er nevndur í lógaruppskotinum. Annars hava øll feløgini møguleika at gera sínar viðmerkingar og senda hesar til MEGD. Limafeløgini hava somuleiðis møguleika fyri sjálvi at senda sínar viðmerkingar beinleiðis til myndugleikan, sum varðar av lógaruppskotinum, og hendan møguleika eru tað nøkur limafeløg, sum brúka. Annars sendir MEGD hoyringssvar til øll lógaruppskot, sum koma til felagið.
Í rættiliga nógvum førum er hoyringsfreistin einans nakrar fáar dagar, hetta er helst orsaka av freistini at senda uppskot niðan í Tingið.

Í samband við lógararbeiði, møta umboð fyri MEGD í ymisku Løgtingsnevndunum ið varða av lógaruppskotinum.

Formansfundir
22. februar var formansfundur, har orðið brek var á skránni. Somuleiðis varð hildið fram við at formenn sótu saman í bólkum, somuleiðis var framløga um formans- og nevndararbeiði.

31. august var aftur fundur, og var framløga á hesum fundinum um MEGD í mun til limafeløgini. MEGD arbeiðir við málum, ið hava felags áhuga t.d. fylgjarakortum, har MEGD ger avtalur, ið allir limir í limafeløgunum hava ágóðan av.

Somuleiðis var Bygnaðurin í MEGD á skránni: Aðalfundurin er hægsti myndugleiki, meðan starvsnevndin er hægsti myndugleiki millum aðalfundir.

Starvsnevndin setur og loysir úr starvi aðalskrivaran, ið er hægsti dagligi leiðarin í MEGD. Hetta er alt staðfest í viðtøkunum hjá MEGD.

Tosað varð um skuggafrágreiðing og um niðurstøðurnar úr ST og hvussu umráðandi tað er, at feløgini hava ein felags front og brúka niðurstøðurnar í sínum arbeiði.

MBF nýtt navn
Nógv kjak hevur verið um orðið brek, og varð skipað fyri tveimum pallborðsfundum í februar 2017 undir heitinum “Ber orðið brek”.

Á formansfundinum 22. februar, vóru báðir pallborðsfundirnir til umrøðu, somuleiðis orðið brek. Tosað var um tað er nøktandi at hava orðið brek í navninum hjá meginfelagnum? Skal meginfelagið broyta navn?

Í samband við hesar pallborðsfundir, og umrøðuna um orðið brek, fekk meginfelagið fleiri uppskot til nýtt navn, og onkur av pallborðsluttakarunum segði, at meginfelagið eigur avgjørt at fáa eitt navn, har orðið brek ikki er partur av navninum..

Formenninir vóru bidnir um at hava følihornini úti, um tey fáa varhugan av onkrum tankum, og at siga frá, tí alt hevur áhuga.

Á aðalfundinum 5. apríl 2017, legði forkvinnan uppskot fyri aðalfundin um at biðja aðalfundin um heimild at arbeiða við at broyta navn á meginfelagnum. Tað hon kundi hugsa sær er, at meginfelagið fær eitt navn uttan orðið brek í navninum.

Forkvinnan greiddi frá, at tað hon ynskir er at broyta navnið og búmerki hjá felagnum. Innihaldið í tí, meginfelagið skal arbeiða við, verður ikki broytt.

Starvsnevndin ynskir at vita støðuna hjá limunum, tí um teir eru ímóti at broyta, verður tað ikki gjørt. Hevur verið nógv kjak um hetta á formansfundi og í starvsnevndini. Fleiri av limafeløgunum kenna ikki, at tey bera brek.

Samtykt var uttan atkvøðugreiðslu at fara víðari. Fundurin tók undir við, at starvsnevndin arbeiðir víðari við málinum.

Limafeløgini verða tikin við í tilgongdini, og áðrenn felagið broytir navn, skal nýggja navnið góðkennast á aðalfundi.

Á fomansfundi 31. august var nýtt navn á skránni. Forkvinnan kunnaði formenninar um, at starvsnevndin hevur samtykt, at í samband við navnabroyting, verður navnakapping skrivað út, hetta so at øll kunnu senda uppskot um navn og nýtt búmerki inn. Hon spurdi, um nakar var ímóti, men tað var ongin.

Starvsnevndin avgjørdi á fundi 28. september, at skriva út navnakapping 23. oktober, og at møguleiki at senda inn uppskot til nýtt navn varðar fram til 10. november, og at vinnarin av navnakappingini fær eina virðisløn áljóðandi kr. 15.000.

Tá freistin at senda uppskot til nýtt navn varð av, vóru 157 uppskot komin inn.

Á starvsnevndarfundi 22. november vóru øll 157 uppskotini lisin upp saman við grundgevingunum fyri, hví júst hetta navnið var hóskandi. Burturúr teimum 157 uppskotunum vóru 26 uppskot tikin úr rúgvuni, sum arbeiðast skuldi víðari við.

10. januar 2018 vóru tey 26 uppskotini tikin upp á starvsnevndarfundi. Tó var einki av teimum 26 fyrst útvaldu uppskotunum, ið vóru sjálvsøgd, og tí var avgjørt at fara aftur í bunkan av uppskotum, sum í fyrru syftu vóru tikin frá. Har var so eitt navn funnið, ið vísti seg at vera hóskandi, og tók starvsnevndin undir við hesum navninum.

Ringt varð á starvsnevndarfundinum til málkønt fólk at spyrja okkum fyri, og varð sagt, at tað er gott at fáa eitt nýtt orð inn í føroyska málið, sum verður brúkt á ein positivan hátt. Orðið verður her eitt sernavn, og hóast tað ikki stendur í Sprotanum, er hetta neyvan nakar trupulleiki. Afturat tí verður orðið bara bent í hvørsfalli, ið neyvan ofta veður brúkt. Orðið hevur ikki serføroyskir bókstavir, sum ger tað lættari við telduposti og heimasíðu.

Búmerki: á starvsnevndarfundinum 10. januar 2018, var eisini avgjørt at arbeiða víðari við búmerkinum, sum ikki varð sent alment út sum kapping við tí grundgeving, at best hevði verið at avdúka bæði navn og búmerki í senn. Eisini taldi tað eitt sindur, at hetta var bíligari. Eitt ávíst arbeiði varð lagt í at finna rætta persónin at átaka sær uppgávuna at gera búmerki, og fall valið á Else Sjúrðaberg, sum hevur egið virkið og er grafikari. Hon játtaði alt fyri eitt og var positiv og spent. Avgjørt var so, at hetta arbeiðið skuldi fylgjast upp av forkvinnuni og aðalskrivaranum, sum samskiftu við grafikaran.

Tann 21. februar var Else Sjúrðaberg á starvanevndarfundi við uppskoti um búmerki. Um búmerkið skrivar Else:

BÚMERKIÐ MEGD

MEGD skrivað eitt sindur øðrvísi - á ein viðarbul.

Tankin við at skriva MEGD á henda hátt er, at lívið er ikki beint fram. Vit møta avbjóðingum í lívinum, sum gera, at vit fara umvegir, niður á næstu reglu - tað ger onki - viðhvørt høvdu vit ikki vilja verið tað fyri uttan.

Viðarbulurin

Sprotin sigur: "viðarbulur: meginlutur av træ ið greinar vaksa út frá"

Hetta er en góð mynd av MEGD, sum er sterkt og sjálv stamman í trænum. Viðarbulurin leggur lunnar undir at greinar og bløð nørast.

Grøni liturin er tekin upp á nøring, vøkstur, orka, tryggleika …

Skapið á viðarbulinum er ikki ein fullkomin rundingur. Fólk fara nokk ikki at vita, at hetta er ein viðarbulur, men undrast yvir, hví skapið er soleiðis. So verður spurt og høvi gevst at greiða frá og fáa samtalur ígongd.

Ringurin á viðarbulinum kann eisini ímynda vernd og felagsskap.

Nýggja navnið og búmerki vóru løgd fram til góðkenningar á eykaaðalfundi tann 27. februar, og vóru bæði navn og búmerki einmælt samtykt.

Onnur tiltøk
Tann 3. desember skipaði MEGD fyri tiltaki í Løkshøll í samband við altjóða brekdagin. Hetta er fyrstu ferð í fleiri ár, at tað er MEGD, ið skipar fyri degnum. Í ár helt Jacob Nossell fyrilestur um inklusión og lívsgóðsku.

Tiltakið eydnaðist væl, og varð hampiliga væl av fólki við til dagin.

Heimasíðan
MEGD hevur eina virkna heimasíðu, sum vit meta er sera umráðandi. MEGD hevur eisini eina virkna síðu á Facebook.

Húsið
Fleiri av limafeløgunum nýta høvi, at nýta hølini í MEGD, somuleiðis er áhugin frá øðrum vaksin, at leiga hølini.

Í 2017 vóru allir teir gomlu reyðu møblarnir koyrdir niðan á endurnýtsluna, og hevur MEGD keypt eina nýggja svarta sofu til stovuna. Skrivstovurnar hava fingið nýggjar møblar. Ætlanin er so við og við at gera húsið meiri egna til fundarvirksemi og tað tørvur annars er á.

Umboðan í Ráðum og nevndum

Ráðið fyri brekað
Formaðurin í MEGD er føddur limur í ráðnum. Sum umboð fyri MEGD situr harumframt Ruth Thomsen frá Blindafelagnum.

Ljóðbøkur
Margreta Næs hevur sitið sum umboð fyri MEGD í nógv ár, men er hon farin frá vegna aldur. Orsaka av at arbeitt verður við at umskipað stýrið er ongin limur í stýrinum frá MEGD í løtuni.

Ráðið fyri ferðslutrygd.
Herit Joensen, Vestmanna, situr sum umboð fyri MEGD og hevur hon verið umboð í ráðnum í nógv ár.

Serflutningsskipanin.
Ása Olsen, aðalskrivari í MEGD, situr sum umboð fyri MEGD og skrivari í stýrinum fyri Serflutningsskipanina.

Psykiatriska sjúklingakærunevndin.
Fyri MEGD situr Sámal Lindenskov, sálarsjúkrarøktari og leiðari á sambýlinum í Eysturstræti, og sum varalimur situr Súna Mørk, limur í nevndini í Sinnisbata.